## Funnu ikki genturnar

**Tær báðar ensku genturnar, sum hvurvu næstseinasta vikuskiftið, eru framvegis ikki komnar afturíaftur. Jessica Chapman og Holly Wells eru tíggju ára gamlar.**

Gjáranáttina leitaði løgreglan í nøkrum urtagørðum, har fólk høvdu grivið nýliga, men seinni varð boðað frá, at leitingin hevði verið til fánýtis.

320 løgreglumenn og serfrøðingar av ymiskum slagi arbeiða nú við málinum um tær báðar horvnu genturnar. Fyrradagin sóknaðist løgreglan eftir einum grønum bili, sum varð sæddur á staðnum, haðani genturnar hvurvu næstseinasta sunnukvøld, men enn er bilurin ikki funnin. Maðurin, sum koyrdi tann grøna bilin, hevur heldur ikki gjørt vart við seg.

## Nú skal tað verða

**Forsetin í Pakistan, Pervez Musharaf, hevur enn einaferð lovað at fara í hernað ímóti teimum víðgongdu muslimsku felagsskapunum, sum hava skipað fyri fleiri atsóknum í Pakistan í seinastuni.**

Í einari útvarps- og sjónvarpsrøðu segði forsetin, at hann hevur givið løgregluni og fregnartænastuni boð um at fara harðliga fram ímóti teimum víðgongdu, og forsetin legði afturat, at tað gongur tann rætta vegin.

Forsetin hevur sett sjey muslimskum felagsskapum forboð fyri at virka, men tað hevur ikki steðgað harðskapinum, heldur tvørturímóti. Bara í síðstu viku doyðu ellivu fólk í álopum á kristnar stovnar í Pakistan.

## Helvtin hótt av hungri

**Samstundis sum forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, heldur fast um, at teir hvítu bøndurnir í landinum skulu fara av sínum gørðum, upplýsir ST, at umleið helvtin av landsins fólki eru hótt av hungursneyð.**

Sambært ST hava seks milliónir fólk í Zimbabwe tørv á matvøruhjálp eftir drúgvan turk. Ringast stendur til í bygdunum, men eisini í býunum eru fleiri matvørur farnar at ganga undan.

Talsmenn hjá ST siga, at tað fer at gera støðuna uppaftur verri, heldur Mugabe fast um kravið, at teir hvítu bøndurnir skulu fara av gørðunum.

## 28.000 svenskir nazistar

**Í gjár almannakunngjørdi svenski rithøvundurin Tobias Húbinette nøvnini á 28.000 svenskum nazistum. Nøvnini standa í einari bók, sum kom út í gjár.**

Sviar hava ikki havt stórvegis hug at tosa um svensku nazistarnar undir seinna heimsbardaga, og tí er nýggja bókin sjáldsom. Aðrir, sum hava arbeitt við sama evni, siga, at bókin avdúkar, at svensku nazistarnir vóru ikki so fáir, sum tey flestu hava hildið.

Í bókini skrivar Tobias Húbinette m. a., at nakrir túsund vóru limir í teirri hørðu nazistisku kjarnuni, og at teir vóru til reiðar at skipa eina Quisling-stjórn í Stockholm, komu týskararnir til Svøríkis.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Væntar meiri vatnflóð og meiri turk

**Veðurfrøðingurin Ignacio Rodriguez-Iturbe, sum í hesum døgum fær viðurkenning fyri sítt granskingararbeiði, væntar, at tað verður turrari nógvastaðni á Jørðini í komandi árum, samstundis sum vatnflóð verður javnan aðrastaðni**

UMHVØRVI
*Árni Joensen*

Tann venesuelanski veðurfrøðingurin, sum í hesum døgum er í Stockholm, har hann fær handaða viðurkenningina Stockholm Water Prize fyri sínar veðurlagsgranskingar, hevur ikki góðar vónir um veðurlagið í komandi tíðum.

Sum so mangir av hansara starvsfeløgum er hann ikki í iva um, at fyribrigdið El Nino, sum ger um seg í Kyrrahavinum umleið fimta hvørt ár, hevur havt sera stóra ávirkan á veðurlagið nógvastaðni tey seinnu árini. Kanningar í seinastuni hava víst, at El Nino er í ferð við at menna seg aftur nú, og hildið verður, at tað verður í hæddini einaferð um ársskiftið.

Ignacio Rodriguez-Iturbe sigur, at sum kunnugt er tað trupult at siga nakað um veðrið, men við teimum fylgisveinum og radarstøðum, sum eru í dag, ber til at boða frá komandi ódnarveðri í rímiliga góðari tíð, og harafturat hevur vísindin útgerð, sum kanna fylgja við, hvussu El Nino mennist, sigur hann. Við áhaldandi gransking fer tað helst eisini at bera til at siga, hvussu avfallið verður ymsastaðni kring heimin, sigur hann.

Hann er ikki í iva um, at við politiskum vilja og beinleiðis tiltøkum ber til tað til at avmarka skaðan av turki og vatnflóð. Venesuelanski veðurfrøðingurin sigur, at við umfatandi samstarvi ber tað til at bøta um skaðan, men verður haraftur ímóti einki gjørt, fara viðurskiftini bara at versna.



*Myndir sum hendan í Eysturríki verða uppaftur vanligari í komandi tíðum, samstundis sum turkur verður vanligari og drúgvari aðrastaðni, enn hann nú er. Men tað ber til at avmarka skaðan.*

# USA misnýtir 11. september

**Iranski forsetin, Mohammad Khatami, sigur, at amerikanarar fáa fólk um allan heimin at hugsa um kríggj**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Mohammad Khatami heldur, at átakið hjá amerikanarum ímóti al-Qaeda og Taliban kann elva til óstøðug viðurskifti víða um heimin.

-Eg haldi, at teir amerikansku leiðararnir hava misskilt støðuna, og at teir hava eina skeiva uppfatan av sínari egnu megi og sínum áhugamálum, segði iranski forsetin á einum tíðindafundi í afghanska høvuðsstaðnum Kabul. Hetta er fyrstu ferð í fýra ár, at ein iranskur ríkisleiðari vitjar Afghanistan, og í Kabul hevur Khatami m. a. hitt Hamid Karzai, forseta. Iran hevur fyrr givið lyfti um, at landið fer at lata 4,3 milliardir krónur til arbeiðið at endurreisa Afghanistan.

-Við at misnýta tilburðin tann 11. september hava amerikansku statsmenninir skapt eitt heimsumfatandi umhvørvi, sum er átøkt kríggi. Tann, sum er sterkastur, hevur eisini ta størstu ábyrgdina, segði Khatami uttan at taka amerikansku ætlanina um at leypa á Irak upp á tunguna.

Iransku myndugleikarnir váttaðu mánadagin, at teir hava sent 16 menn til Saudiarabia, tí illgruni er um, at teir vóru limir í al-Qaeda.



# Slætt borð á tingi

**Tingmenn kunnu halda frí næstu vikurnar, tí hóast vit hava júst hava valt nýtt ting, og hóast nýggj samgonga er skipað, so er einki lógaruppskot til viðgerðar á tingi**

TINGARBEIÐI
*Eirikur Lindenskov*

– Eingi mál eru at viðgera í tinginum í løtuni, øll málini eru avgreidd. Hetta sigur Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Tað kann tykjast løgið, at eingi uppskot eru frammi, nú løgtingsval júst hevur verið og nýggj samgonga er skipað. Men Edmund Joensen vísir tó á, at hetta vanliga er ein sløk tíð politiskt, men hann hevði kortini roknað við, at meira var at gera hjá nýggja tinginum nú.

– Tey stóru málini eru avgeidd, løgmansrøðan, uppskotið um fiskidagar og eykajáttanarlógin. Eftir eru nakrir fyrispurningar, sum landsstýrisfólkini skulu hava 20 dagar til at svara, sigur hann.

At tað er so soltið, heldur Edmund Joensen kann skyldast orrustuna í samgonguni seinastu tíðina. Hann heldur, at hetta kann hava gjørt samgonguna lamna.



*Edmund Joensen tekur við sum løgtingsformaður, 15. mai. Hetta er fyrstu ferð, at andstøðan á tingi eigur tingformannin – tað heldur Edmund Joensen vera eina styrki fyri demokratiið*

### Fyrsti formaður úr andstøðuni

Tað er fyrstu ferð, at tingið hevur valt ein løgtingsformann, sum ikki er partur av samgonguni. Hetta er tó vanligt í øðrum londum. Edmund Joensen heldur, at tað er ein fyrimunur, og at tað er gott fyri demokratiið. Hann sigur eisini, at síðani vit fingu nýggja ting- og stýrisskipan, hevur verið roynt at tillagað tingarbeiðið eftir hesum. Hetta arbeiðið fer at halda fram við honum sum tingformanni.

– Ein broyting, sum vit ætla at fremja, er viðvíkjandi spurningum frá tingfólki til landsstýrisfólkini.

Sum er eru trý sløg av spurningum: Vanligar skrivtligar fyrispurningar, sum landsstýrisfólkini hava 20 dagar um at svara, síðani hava vit munnligar fyrispurningar og so ófráboðaðar fyrispurningar.

### Dagsaktuellir spurningar til landsstýrið

Edmund Joensen sigur, at ætlanin nú er hvørja viku at hava dagsaktuellar spurningar, sum tingfólk kunnu seta landsstýrisfólkunum. Tey fáa ein dag at svara spurninginum.

– Ætlanin er at hava hesar spurningar á skránni hvørja viku. Á hendan hátt fáa vit betri javnvág millum løgting og landsstýrið, sum kanska fór eitt sindur av lagi við nýggju stýrisskipanin, heldur Edmund Joensen.

– Á hendan hátt fáa vit eitt orðaskifti millum tingfólk og landsstýrisfólk um dagsaktuella politikkin, og tað kann bara styrkja demokratiið, heldur løgtingsformaðurin.

### Fáa betur lagt til rættis

Um tingarbeiðið sigur Edmund Joensen, at vanliga skipanin verður, at mánadagurin verður burtur av brúktur til nevndararbeiðið. Somuleiðis verður fyrraparturin týsdag, mikudag og hósdag settur av til nevndararbeiðið, meðan tingfundirnir verða hildnir seinnapartin týsdag, mikudag og hósdag. Fyrraparturin fríggjadag verður eisini settur av til tingarbeiðið.

– Á henda hátt fáa bæði ting- og landsstýrisfólk lagt sær arbeiðsdagin til rættis. Men er tað okkurt stórmál, sum t. d. fíggjarlógarviðgerð, so verða sjálvandi heilir dagar settir av til tingfundir, sigur Edmund Joensen.

Í seinasta valskeiðið samtykti løgtingið munandi lønarhækking til tingmenn, sum fóru úr umleið 16.000 krónum í mánaðarligari grundløn upp í góðar 25.000. Grundgevingarnar vóru, at tingmenn skuldu vera tingmenn burturav. Tingmenn í almennum starvi, kunnu bara hava hálvtíðar starv hjá tí almenna umframt tingarbeiðið. Fyri tingmenn, sum eru í privatari vinnu, er ikki lóggivið um arbeiði umframt tingarbeiðið.

Edmund Joensen heldur, at hetta hevur broytt hugburðin og arbeiðslagið hjá tingmonnum, og at tað merkist, at tingmenn nú eru betri fyrireikaðir, eitt nú til framsøgurøður.

Næsti tingfundur er ikki lýstur enn.

# Kirkjukórið Ljómur liðugt við upptøkur

**Føroyskar kórfløgur eru ikki gerandiskostur, men nú eru upptøkur lidnar við einum av drúgvastu og best kendu kórum í landinum, nevniliga Ljómi. Góð fólk hava verið um kórið og fløgan væntast í november**

KÓR
*Dagfinn Olsen*

Kirkjukorið Ljómur í Vági er júst liðugt við upptøkur til eina fløgu. Fleiri ferðir hevur vegurin framvið kirkjuni í Vági verið stongdur, tí upptøkurnar eru farnar fram í kirkjuni. Kend og góð fólk hava verið um kórið undir upptøkunum.

Kendi kórleiðarin Johannes Rahe hevur leitt kórið. Hann er kendur og viðurkendur, hevur verið í Føroyum fyrr, eittnú í samband við Nóatón. Hann hevur eisini stjórna í Sankta Pæturskirkjuni í Rom.

Rúni Brattaberg kennir væl kórleiðaran frá samstarvinum í Nóatón og fekk samband í lag millum Ljóm og Rahe, ið er kendur fyri eisini at duga væl at læra frá sær, bæði leikfólk og børn.



*Johannes Rahe og Matti Heinonen avmyndaðir í Vági. Teir hava hjálpt Ljómi við upptøkum og fóru av landinum aftur í gjár*

Mynd: D. Olsen

Matti Heinonen hevur staðið fyri at taka upp. Hann er viðurkendur upptøkumaður, sonevndur tekniskur inginørur, ið er vanur at taka sær av truplum upptøkum, t.d. opera. Hann hevur eisini egin upptøkuhøli.

Tætt samstarv er millum ljóðmann og kórleiðara undir kórupptøkum og Rúni Brattaberg átók sær at vera millummaður, eisini málsliga, og lætti hetta væl um.

Fløgan við Ljómi kemur ætlandi fyrsta sunnudag í november, allahalgannadag, og tá verður konsert.

18 sálmar og sangir eru á fløguni, mest kent tilfar. Sum nakað forkunnugt er at nevna, at Tjóðsangurin verður sungin við nýggju útsetingini hjá Bjarna Restorff, og hon er ikki sungin áður á bandi ella fløgu.

Kendi myndamaðurin Per Folkver, sum hevur givið bók út um Føroyar, og nú starvast hjá Politiken, hevur tikið myndir til fløguhúsan.

## SvF fer at senda úr tinginum

TINGFUNDIR
*Eirikur Lindenskov*

Í framtíðini fer at bera til hjá fólki at síggja og hoyra tingfundirnar í sjónvarpi. Seinastu árini hevur sjónvarpið sent ljóðið úr tinginum, meðan royndarmyndin er á skerminum. Á henda hátt ber til hjá fólki at fylgja við tingfundi, um sjónvarpið ikki hevur annað á skránni.

Í nýggja tingsalinum eru sett upp upptøkutól, og í framtíðini fer Sjónvarp Føroya eisini at senda myndir frá tingfundinum.

– Ætlanin er at hava tvey myndatól, sum skifta automatiskt millum røðarapallin og salin, sigur Jón Heðin Tróndheim, tekniskur leiðari í Sjónvarpi Føroya.

Hann sigur tó, at endaliga er ikki avrátt, hvussu hetta verður lagt til rættis. Eisini er tað ein spurningur um pengar, nær sjónarpið er klárt at senda myndirnar, útgerðin í tinghúsinum er sett upp, men enn vantar útgerðin, sum skal fáa myndirnar úr tinginum niðan í sjónvarpið.

Jón Heðin Tróndheim væntar, at skipan verður klár einaferð í komandi ári.